Starvsfólk til Ferðaráð Føroya

Ferðaráð Føroya sóknast eftir einum starvsfólki til innlendisdeildina. Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður at seta sum skjótast.

Arbeiðið fevnir um samskifti og samstarv við økisferðavinnufeløg, kommunur, aðrar myndugleikar og vinnuna um verkætlanir av ymsum slag.

Arbeiðið verður lagt til rættis í samstarvi við leiðslluna.

Vit vænta, at umsøkjarin hevur hesar førleikar:

- Útbúgving og royndir innan ferðavinnu og møguliga innan verkætlanarleiðslu
- Holla vitan um Føroyar sum ferðamannaland og føroysk viðurskifti sum heild, herundir vitan um flutnings-, gistingar- og útferðarmøguleikar
- Kunnleika til og um aktørar í ferðavinnuni
- Dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum og hevur góðan telduførleika.
- Hevur góð samstarvsevnir og dugir at arbeiða sjálvstøgt

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið/viðkomandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal vera Ferðaráðnum í hendi, í seinasta lagi 28. desember 2001.

Ferðaráð Føroya
Postmoga 118
110 Tórshavn

Ynskjast fleiri upplýsingar um starvið, kunnu áhugaði venda sær til leiðaran á Innlendisdeild Ferðaráðsins, Per Hansen, á telefon: 31 60 55 ella teldupost: per@tourist.fo

Leiðari til Dagstovnin á Oyri

Hervið verður søkt eftir leiðara at byrja 1. februar 2002.

Dagstovnurin er í dag normeraður til 40 børn, harav 26 í barnagarðinum og 14 í vøggustovuni.

Hann/hon, ið settur verður, skal vera útbúgvin pedagog.

Lønin sambært sáttmála millum Føroya Pedgogfelag og FKA.

Umsóknin skal stílast til Sunda Kommunu, 460 Norðskála, og vera kommununi í hendi í seinasta lagi 27. des. 01.

Sunda Kommuna
Kommunuskrivstovan
460 Norðskála

Lærari søkist

Søkt verður eftir lærara til Hósvíkar skúla.

1 starv 14 tímar um vikuna fyri lærara í barnsburðarfarloyvi.
Á tímatalvuni er: Handv./list, ítrótt, teld, heimstaðarlæra og kristni.

Starvið er tíðaravmarkað frá 3. januar til 19. juni 2002.
Løn sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Nærri fæst at vita, við at ringja til skúlaleiðaran á tlf. 422259 ella 422526.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 18. desember 2001.

Skúlastýrið fyri Hósvíkar skúla
v/Adolf Johannessen, form.
FO-420 Hósvík

Tvingsilssøla

Hósdagin 10. januar 2002, kl. 9.00 verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 106 c, Trongisvágur.**

Ognin er grundøki 1268 m² til støddar við ástandandi sethúsum. Húsini eru úr betong við timburskjøldrum og aluminiumstaki. Húsini eru uml. 170 m² í einari hædd.

Húsini eru innrættað soleiðis:

2 gangir, forstova, køkur, fýrrúm, w.c. við brúsu, 4 kømur, baðverilsi, gangur og stór stova.

Húsini eru bygd í 1978 og hava frítt útsýni yvir fjørðin.

Sølan er umbiðin av **Fríðu Paturssun, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 20010666)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Føroya Fútarættur

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3277
Navn: Sp/f Drós
Adressa: Bøgøta 15, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 01.10.2001
Viðtøkudato: 01.10.2001
Kapitalur: Kr. 200.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 200.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Fía Norðberg, Ovaragøta 3, 188 Hoyvík.
Nevnd: Janus Norðberg, Ovaragøta 3, 188 Hoyvík (formaður), Fía Norðberg, Ovaragøta 3, 188 Hoyvík og Karin A. Dahl, Brekkugøta 2, 100 Tórshavn.
Stjórn: Fía Norðberg, Ovaragøta 3, 188 Hoyvík og Karin A. Dahl, Brekkugøta 2, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjórunum í felag.
Grannskoðari: : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 7. desember 2001

Kristin Balle

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Rættleiðing til kunngerð

Í kunngerðini um broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, viðvíkjandi umráðispartinum D3, stóð av misgáum skrivað, at D3 lá vestan fyri R.C. Effersøesgøtu, tað rætta er eystanfyri.

Kunngerðin ljóðar sostatt:

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 15. november 2001 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin, at ein partur av D3 umráðispartinum, kannað stórum almennum stovnum fyri umsiting, heilsurøkt og tílíkt, uppi á Hálsi, eystan fyri R.C. Effersøesgøtu, verður broytt til A1 sethúsaøki.

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá fríggjadegi 7. desember til og við 4. januar 2002, allar gerandisdagar uttan leygardag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 8. mars 2002.

SNARSKIVAN

Aðalfundur

verður í Norðurlandahúsinum **fríggjadagin tann 28. desember 2001 kl. 10.00 við hesi dagsskrá:**

a) Val av fundarstjóra
b) Frágreiðing formansins um virki felagsins í farna ári
c) Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi
d) Val av nevndarlimum og eykalimum
e) Val av grannskoðara og tiltaksmanni
f) Ásetan av limagjaldi og formansløn
g) Ymiskt

Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Mold fæst

við at taka ímóti henni.

Grót ynskist til keyps í Tórshavn.

Tlf. 214727 ella 227255

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

NISSAN PATROL
árg. 85, longra modellið v/ setrum aftan. Sýnaður nov. 01, til sølu fyri 18.000 kr.
Tlf. 316974

NISSAN KING CAB 4x4
árg. 86, bíliga til sølu.
Tlf. 373556 - 211077

NISSAN PATROL 4x4
árg. 87, bíliga til sølu.
Tlf. 373556, 211077

TOYOTA CARINA 1,6
frá 87, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 311688, e. kl. 18

TIL SØLU
Fýra hampulig Goodyear pikadekk til Avensis til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 311105

TIL SØLU
Ford Sierra 1,6, árg. 98, sýnaður nov. 2001, sær gott út, til sølu fyri 14.000 kr.
Tlf. 447769 - 222118

NISSAN MICRA
við skaða til sølu.
Tlf. 318596

XANTIA 1.9 TD
Citroen til sølu: Bilurin er í sera góðum standi við nógvum eyka útstýri, so sum, sportfelgur, cd spælara til 10 fløgur, avtakiligan sleipikrók. Bilurin er árg 96/6 er bláur og hevur ikki havt skaða. Selist vegna keyp av nýggjum bili. Kom og royn bilin...
Tel. 354353 ella 214699

BMW 525 TDS
aut. gear, árg. 93, sýnaður okt. 2001, í góðum standi, til sølu. Møguliga kann annar bilur ganga inn í keypið. Prísuppskot: 135.000 kr. Meira fæst at vita á
tlf. 213577

SUZUKI SWIFT
4 x 4, treingir til ábøtur, til sølu fyri hægsta boð.
Tlf. 213810 ella 318808

SKODA FELICIA LX 1.3
árg. 96, km 70.000. Vælhildin bilur til yvirtøku 1. jan. 2002. Prísur kr. 45.000.
Ring eftir kl. 17 á tlf. 321221

TIL SØLU
Fýra titanium felgur, 7x15" 5 hol, við tveimum dekkum, 205-50 R 15, passa til Toyota Carina 2, Carina E og Camry.
Tlf. 227922

EYKALUTIR
til Toyota Hiace diesel, árg. 90-95, til sølu.
Tlf. 227922

TIL SØLU
Chevrolet Malibu, árg. 80, til sølu. Treingir til eina bøtandi hond. Sýnaður í sept. 01. Kostnaður 4.000 kr.
Tlf. 320202, e. kl. 18

TIL SØLU
Honda CX 500, árg. 79.
Tlf. 321505

TIL SØLU
VW Golf, árg. 87, til sølu fyri uml. 9.000 kr.
Tlf. 215887

NISSAN CHERRY 1.3
Árg. 86, koyrt 120.000 km. til sølu fyri kr. 5.000,00.
Tlf. 250053

CAMPINGVOGNUR
til 7 persónar, hevur gassovn, gasskomfýr, kuldaskáp og annað, til sølu fyri 14.000 kr.
Tlf. 223527

VOLVO 244
árg. 81, nýsýnaður og í góðum mekaniskum standi, er skøddur til veturin, til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 373889

TIL SØLU
Svartur Opel Kadett 2.0 GSI, koyrt 176.000 km, bíliga til sølu.
Tlf. 251414

TIL SØLU
Bláur VW Golf 1.9 diesel, árg. 92, til sølu.
Tlf. 223352

TIL SØLU
4 kavadekk við felgu, stødd 165/14, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 254618

TIL SØLU
Mazda B-2500 pick up, koyrt 19.400 km, árg. 11/05/2000, til sølu fyri 123.000 kr.
Tlf. 457860 / 224496

FORD SCORPIO 2,4
bíliga til sølu.
Tlf. 312998 - 255333

FORD SIERRA
Árg. 87 bíliga til sølu. Nýsýnaður.
Tlf. 423198

Arbeiði

HØVUÐSREINGERING
Tilkomin, røsk og dugnalig kvinna søkist at gera reint í privatheimi í Miðvági beint eftir nýggjár. Góð løn. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill. mrk. 1236-6

HÚSASMÍÐ OG UMVÆLING
Alt timburarbeiði verður gjørt, nýtt sum gamal innan og uttan. Fa. Húsaumvæling,
tlf. 215214

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR
5 mør. gamal barnavognur og stólur, myrkabláur og hvítur, næstan einki brúktur, til sølu fyri 2.800 kr. (nýprísur 4.800). Flugunet og regnslag fylgja við. Systkinasetur kann eisini fylgja við fyri 300 kr.
Tlf. 448595 e. kl. 18.00

BARNAVOGNUR
Slitin, men heilur og heitur, góður hjá børnum at sova úti í, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 314624 - 215353

SIMO BARNAVOGNUR
Ein svartur Simo vognur av slagnum Alu til sølu v/ regnslagi, tasku og fluguneti fyri 3.000 kr.
Tlf. 318024, e. kl. 16

TREMMUSONG TIL SØLU
Gomul myrkabrún tremmusong til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 226686 - 315698

STÓLUR/VOGNUR
Kombineraður, BRIO-framleiðsla, við kalesju, til sølu.
Ringið 313356 aftaná kl. 18

TIL SØLU
Grá, leðurlook babylift, Myrkabláur Chicco beriseli. Baby leikur kunnu fylgja við.
Tlf. 449339 ella 261374

Bátaútgerð

TIL SØLU
Lítið 5 mannafar, glasfibur, við páhangsmotori til sølu.
Tlf. 215308

TIL SØLU
Gear av merkinum Hurth til sølu.
Tlf. 447769 - 260956

27 FÓT VIKSUND
til sølu. Hevur fiskiloyvi og alla útgerð.
Tlf. 443351, e. kl. 17

Bingo

STÓRT EYDNUHJÓL
verður í Skúlanum á Fossánesi leygarkvøldið 15. des. kl. 20.00. Ein ørgrynna av vinningum: Jólaøl, sodavatn, fleskasteikir, røst før. krov, olja, dukkur, bílar, dukkuvognar, fartelefonir, Playstation 2 frá 3'aranum og mangt, mangt annað.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

JÓLABINGO
verður í Handilsskúlanum á Kambsdali leygardagin 15. des. kl. 16.00.
Eldrafelagið Borgin

BINGO
verður í Pálsstovu 15. des. kl. 15.00. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli tríggjar før. gæs og 3x1000 kr. Drigið verður millum søplini. Eykaspæl. Mini-bingo. Koyring heim.
Kiwanisklubbin Rósan

GOTT JÓLABINGO
verður í Pálsstovu fríggjadagin 14. des. kl. 19.00. 400 kr. til fulla plátu. Drigið verður millum søplini. Á lutaseðlinum dunnur, før. gæs, turr tjógv og 2 før. røst krov. Koyring heim.
Lymfødemfelagið

RIMMAR BINGO
verður í Pállstovu 17/12 kl. 19.00. Koyring heim eftir bingo. Vit takka fyri stuðulin í ár 2001. Gleðiligt jól og gott nýggjár.
Astma-/Allergifelagið

RIMMAR JÓLABINGO
verður í Framtíðini 13. des. kl. 19.30. Annaðhvørt bingo tvær dunnur og annaðhvørt ein karamelluleska. Høvuðsvinningur á lutaseðli m.a. balja við alskyns jólamati. Eykaspæl verður aftaná. Søla av kaffi og rís á la mande verður í steðginum.
7. fl. í Vágs skúla

Bøkur

TIL SØLU
Før. bøkur og onkur donsk av William Heinesen.
Tlf. 261490, e. kl. 20

Burturm. /funnið

JAKKI BURTURMISTUR
Tú sum (av misgáum) tók jakkan tann 1.12., vinarliga legg hann aftur í Club 20 ella ring 313090. Jakkin er stuttur ljóst brúnur, plyss.
Tlf. 313090

KETTA BURTURBLIVIN
Grá- og svørtstríput ketta, hvít undir øsinum, burturblivin. Kettan er seinast sædd í Kristiansgøtu í Hoyvík. Um nakar sær hana ring so vinarliga á
tlf. 319056

Býli

TIL SØLU
Høvuðsumvæld hús í Sørvági til sølu, um hóskandi boð fæst. Húsini eru í trimum hæddum v/ uppibygdum duri og hjalli. Loftið: 4 kømur, wc v/ brúsu, gongd. Miðhædd: Køkur, stova, wc v/ baðikari, gongd. Kjallari: Óinnrættaður.
Tlf. 332404 ella 260004

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit søkja eina íbúð í Havn/Hoyvík frá 1. mai 2002. Vit eru eitt ungt og friðarligt par, hvørgin roykir ella drekkur.
Tlf. 261059, e. kl. 19.30

GOTT VERILSI
v/ atgongd til køk og bað, til leigu.
Tlf. 313865

KAMAR Í HÁLKUNI
Kamar í Tórshavn við øllum hentleikum til leigu í tíðarskeiðnum 22. desember til 10. februar.
Tlf. 213468/310960

KAMAR TIL LEIGU
Kamar í Tórshavn við øllum hentleikum til leigu frá 01. januar.
Tlf. 213468/310960

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu á Glyvrum ella í Runavík.
Tlf. 254866

ÍBÚÐ YNSKIST
til par við barni skjótast gjørligt. Gjalda til tíðina og fara væl um.
Tlf. 257101 - 321001

HÚS Á TVØROYRI
til leigu. Nær við sjúkrahúsið, leigumál eftir nærri avtalu. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1236-3

HÚS TIL LEIGU
Stór sethús miðskeiðis í Havnini til leigu frá 1. mars 2002. Uml. 300 kvm. innrættað – stór og góð rúm. Sera vælegnað til skrivstovur – rímilig parkering. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1236-1

KAMAR/ÍBÚÐ SØKIST
Ungur maður við føstum arbeiði og fer væl um søkir eftir kamari ella íbúð í Havn, á Argjum ella í Hoyvík.
Tlf. 219088

ÍBÚÐ YNSKIST
28 ára gomul genta søkir eftir íbúð í Keypmannahavn.
Tlf. 22641069 - 32861047

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn. Vit eru tvey vaksin við einum barni. Gjalda til tíðina. Friðarlig og roykja ikki.
Tlf. 216680

HÚS Í SANDAVÁGI
til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 332473 - 252965

LÍTIÐ FIRMA
Lítið firma søkir erhvervshøli, íbúð ella hús!
Tlf. +298 221021 - +4525362789

ÍBÚÐARNEYÐ
Ungt par við eitt ára gomlum barni, søkir íbúð í Havn frá uml. 1. feb.
Tlf. 252164

ÍBÚÐ YNSKIST
20 ára gamal drongur søknast eftir íbúð í Havn fyri sámuligan prís.
Ring 221950 - Jákup Bogi

VERILSI TIL LEIGU
Gott verilsi til leigu v/ atgongd til køk og bað.
Tlf. 313865

STÓR HÚS TIL LEIGU
Uml. 110 fermetrar stór hús við lofti og kjallara til leigu fyri 8.000 kr. um mór. u/ ljós og hita. Depositum krevst. Húsini eru egnað til nógv ymisk endamál.
Tlf. 319584 - Fax 319984

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur maður 27 ár, søknast eftir íbúð í Havn ella Argjum frá 1. jan. 2002.
Tlf. 310141

Dýr

TVÆR SKJALDBØKUR
bíliga til sølu.
Tlf. 316099, e. kl. 16

GÆS TIL SØLU
Steikiklárar gæs til sølu.
Tlf. 311688, e. kl. 18

KANARIUFUGLAR
Tveir vanligir kanariufuglar ynskjast til keyps, helst hon fuglar.
Tlf. 260458

KVÍGUKÁLVUR
til sølu.
Tlf. 328160

KANINUNGI
Lítil, fittur, svartur kaninungi verður latin djóravini.
Tlf. 319854

GOLDEN RETRIEVER
2 ára gomul tík til sølu.
Tlf. 442198

HUNDAHVØLPAR
blandaðir Golden Retriver + Skotskur seyðahundur.
Tlf. 442198

TIL SØLU
Hamstrarabúr við tilhoyri til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 219994

Húsarhaldstól

ZANUSSI KØLISKÁP
bíliga til sølu.
Tlf. 310474, e. kl. 19

KOMFÝRUR
bíliga til sølu.
Tlf. 216167

VASKIMASKINA TIL SØLU
Vaskimaskina av slagnum Zanussi ZF8000 til sølu fyri 2000 kr.
Tlf.: 313059 ella 213059 eftir kl. 17.00

Innbúgv

HORNASOFA
Grá, leður hornasofa til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 371654, e. kl. 17

TIL SØLU
Nelly Kubus Reol i Kirsebær, på hjul med 16 kvadratiske rum. Ca. 170cm x 170 cm. 1800,-
Tlf. 311822 / 223478

TIL SØLU
Glasplade og Marmor sokkel 80x140 cm. sælges for kr. 600,-
Tlf. 311822 / 223478

YMISKT INNBÚGV
bíliga til sølu.
Tlf. 456921

SOFA TIL SØLU
Hornasofa, 2,5x2,5, brúnlitt stríput velour.
Tlf. 314142

DUPULT SOVIBRÍK
til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 219406, e. kl. 16

SKRIVI/ARBEIÐSBORÐ
L=156, B=80, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 219406, e. kl. 16

SPÍSIBORÐ
L=160 + tvær plátur á 40 cm, B=90 og 4 krostólar til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 219406, e. kl. 16

RIMASONG
Vælhildin, hvít rimasong við madrassu til sølu fyri 500 kr. Botnur og síða kunnu flytast upp og niður.
Tlf. 318292

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki